# Tilboð

hp invent

**2.8 GHz við DVD brennara og stórum flatskermi.**



17.900,-

**Compaq Presario 6580**
*2.8 GHz Intel®Pentium®4 Processor*
*512 MB DDR RAM*
*120 GB Harðdisk*
*DVD 16x*
**DVD-brennari (HP 200i DVD+R+RW)**
*Geforce4 MX440 128 MB v/TV-Out*
*56K Modem og 10/100 Mbit Netkort*
*FireWire við software til digitala videoredigering*
*JBL hátalarar*
*Norton Antivirus 2002*
*MS Works Suite 2002 við Word*
*WinXP Home Edition*
**Við 17” Compaq TFT flatskermi**



16.250,-

**Compaq Presario 2516**
*2.53 GHz Intel®Pentium®4 Processor*
*512 MB DDR RAM*
*40 GB Harðdisk*
*DVD spælari og CD brennari*
*Diskettudrev*
*ATI Radeon Mobility við 64 MB minnið*
*15” TFT-skerm (1400x1050)*
*56K Modem og 10/100 Mbit Netkort.*
*FireWire og FastIR*
*JBL hátalarar*
*Norton Antivirus 2002*
*MS Works Suite 2002 við Word*
*WinXP Home Edition*

COMPAQ Local Service Partner

COM-DATA
Klaksvík tlf. 476100 Saltangará tlf. 449840
sola@com-data.fo

www.com-data.fo



FA. GRAVSTEINAR




Opið: mánadag - fríggjadag 9[00]-17[00]
annars sambært avtalu.

Vøruskrá kann fáast!



# AUTO

-Dag & nátt-

-Alt døgnið-

Vilt tú bil hýra
- ring 311234

Nú fáast eisini
Talutíðarkort

Føroya Tele
Kall

BENZIN
DIESEL
KIOSK



AUTO
311234



## Skógvaútsøla

**Rimmar útsøla av skóm verður í Bygdarhúsinum í Miðvági leygardagin 1. mars.**

**Opið er frá kl. 10.00 til 17.00**

***Hjá Randi í Miðvági***



# GARAGUHURÐAR
## til privat og vinnuligt



- Aluminium
- Stál

pf Klement Petersen
Høgaból • 600 Saltangará • tel. 447560 • fax 448460



## Kvikkeyp í Hornabø

Søkt verður eftir fólki yvir 18 ár til kvøld og vikuskiftisvaktir.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja á tlf. 212490.



## Yamaha skutari

Árg. 2001 til sølu.

**Tlf. 448400**



Sosialurin -tað loysir seg

Sosialurin
-tað loysir seg




TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN

## OPIÐ HÚS

**Týsdagin 4. mars 2003**
**kl. 18.00-20.00 í Smiðjugerði**

Skúlin bjóðar **meistarum, foreldrum, ungum** og øllum sum hava áhuga, at vitja skúlan í Smiðjugerði.

Kl. 18.00 verður stutt frágreiðing um útbúgvingarnar og skúlan, síðan verður víst runt og endað verður við einum drekkamunni á Skúlaheiminum.

**TEKNISKI SKÚLIN Í TÓRSHAVN**
Marknagilsvegur 75 · Postsmoga 239
FO-110 Tórshavn
Telefon +298 311957 · Telefaks +298 316621
tst@tst.fo · www.tst.fo

## Frá Tórshavnar Bátafelag

*Í samband við at Tórshavnar Bátafelag fyllir 5 ár í februar í ár verður høli felagsins opið fyri øllum áhugaðum fríggjadagin 28. februar kl. 16.00-19.00.*

**Nevndin**

## Skrivstovulærlingur

Til skrivstovu okkara sóknast vit eftir einum røskum skrivstovulærlingi.

Vit kunnu bjóða tær eitt spennandi og krevjandi starv sum gevur tær nógvar møguleikar at royna alt tað tú hevur lært á FHS ella á HH.

**Arbeiðið umfatar millum annað:**
- vanliga kundatænastu
- at bóka debitorar/kreditorar
- at fakturera
- at røkja debitorar
- og alt annað vanligt skrivstovuarbeiði

Tú hevur FHS ella HH prógv og stórur fyrimunur er um tú hevur góðan førleika at arbeiða á teldu.

Send umsókn og avrit av prógvum tínum til okkara.

Blíðar heilsur

**P/F Thomas Dam Ítróttur og Damfar Heilsøla**
Niels Finsensgøta 5
110 Tórshavn

## Starv á Ferðaráð Føroya

Avloysarastarvið í marknaðardeildini skal nú gerast fast starv. Starvið er eitt fulltíðarstarv og verður at seta sum skjótast.

Arbeiðið fevnir um marknaðararbeiði, so sum samskifti við ferðasmiðir, ferðaskrivstovur og fjølmiðlar, messuluttøka, framleiðsla av faldarum og samskifti við føroysku ferðavinnuna.

Arbeiðið verður lagt til rættis í samstarvi við leiðsluna.

Vit vænta, at umsøkjarin hevur hesar førleikar:
- Útbúgving ella royndir innan ferðavinnu, marknaðararbeiði og verkætlanarleiðslu
- Holla vitan um Føroyar sum ferðamannaland og føroysk viðurskifti sum heild
- Kunnleika til og um aktørar í ferðavinnuni
- Góðan telduførleika og málkunnleika
- Góð samstarvsevnir og sjálvstøðugt arbeiðslag

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og Starvsmannafelagið/viðkomandi yrkisfelag.

Skrivlig umsókn skal vera Ferðaráðnum í hendi, í seinasta lagi 14. mas 2002.

**Ferðaráð Føroya**
Postsmoga 118
110 Tórshavn

Ynskjast fleiri upplýsingar um starvið, kunnu áhugaði venda sær til stjóran, Heri Niclasen, á telefon: 31 60 55

LANDSVERKFRØÐINGURIN

## ÚTBJÓÐING

Við hesum verður arbeiðið viðv. gerð av nýggjari samferðsluhavn á Syðradali í Kalsoynni boðið út í almenna lisitasjón.

Arbeiðið fevnir í stuttum um gerð av tveimun brimgørðum, ávikavist uml. 90 m og 170 m langir, ferjulegu við tilhoyrandi bryggju og parkeringsøki.

**Høvuðsnøgdirnar eru hesar:**

| | |
|---|---|
| Dýping | 700 $m^2$ |
| Uppfylling og planering | 100.000 $m^3$ |
| Spreinging | 96.000 $m^3$ |
| Stoypiarbeiði | 1.000 $m^3$ |

Lisitatiónin verður hjá Landsverkfrøðinginum, Tinghúsvegi 5, Tórshavn, hósdagin 3. apríl 2003.

Útbjóðingartilfarið kann bíleggjast í seinasta lagi 4. mars 2003 og verður útflýggjað móti einum veðhaldi til støddar kr. 10.000, ið verður at flyta á konto nr. 128.220.6 í Føroya Sparikassa ella konto nr. 431.468.0 í Føroya Banka. Veðhaldið verður afturgoldið, um útbjóðingartilfarið er aftursent í seinasta lagi eina viku eftir lisitasjónina.

**Landsverkfrøðingurin**
Tinghúsvegur 5 · 100 Tórshavn
Telefon 311333 · Telefax 314986
Teldupostur: lv@lv.fo

LANDSVERKFRØÐINGURIN

## Verkfrøðingur
### til plan- og prosjektdeildina

Starv sum leiðari av plan- og prosjektdeildini hjá Landsverkfrøðinginum er leyst at søkja.

Plan- og prosjektdeildin er deild undir vegadeildini.

Til rætta fólkið kunnu vit bjóða eitt spennandi og áhugavert starv, ið er fakliga og persónliga menniandi og við góðum arbeiðsumstøðum.

**Arbeiðsuppgávur**
Uppgávur, sum viðkomandi í høvuðsheitum kann rokna við at skula røkja og standa fyri, eru hesar:

- Gera ætlanir fyri landsvegakervinum
- Gera ætlanir fyri trygdartiltøkum
- Programmeringar, forkanningar, prosjektering og prosjektgransking
- Eftirlit við verkætlanum og
- Myndugleikaumboðan

**Førleikakrøv**
Sóknast verður eftir verkfrøðingi við royndum innan omanfyri nevndu virkisøki, og er neyðugt, at umsøkjarin dugir at samskipa og leiða arbeiðið á deildini.

Stórur dentur verður lagdur á góðar persónligar eginleikar, og rokna vit við, at viðkomandi er fyrikomandi og hevur góð samstarvsevni, dugir at skipa sítt arbeiðsøki og kann geva sítt íkast til menning av arbeiðsplássinum og er førur fyri at arbeiða sjálvstøðugt, eggja og ganga undan.

**Setanarviðurskifti**
Tænastustaðið verður skrivstovan í Havn. Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Verkfrøðingafelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum og lívsgongdarlýsing (cv) verða at senda til

**Landsverkfrøðingin**
Postboks 78
110 Tórshavn

og skulu verða skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 10. mars 2003. Brævbjálvin eigur at merkjast »Verkfrøðingur til vegadeildina«. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá Finnleifi Durhuus, leiðari av vegadeildini, á tel. 311333, lokal 213 (e-postur: finnleif@lv.fo).


- Vektir/grader
- Viðlíkahaldsskipan
- Plattaskipan
- Klokkuskipan
- Avreiðing og Avrokning
- Liðugtvøruskipan v/veiðudagbók

COMPAQ Local Service Partner
hp invent
www.com-data.fo
COM-DATA
Klaksvík tlf. 476100 Saltangará tlf. 449840